**Sáttmáli**
**millum**
**Uttanríkis- og vinnumálaráðið**
**og**
**P/F Fiskaaling**

## § 1
## Partarnir

Við heimild í løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2009 verður gjørdur hesin sáttmáli millum Uttanríkis- og vinnumálaráðið, sum stuðulsveitara, og P/F Fiskaaling sum stuðulsmóttakara.

## § 2
## Endamál

Árliga játtan Løgtingsins til havbúnaðarroyndir, kann verða veitt til at stuðla tey í lógini § 2, stk. 1 nevndu endamálum, herundir at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni. Ein partur av játtanini til P/F Fiskaaling fer til at fyrisita tey í lógini nevndu endamálum. Í sáttmálaskeiðinum 2018-2020 fer P/F Fiskaaling at hava høvuðsfokus á gransking, menning og ráðgeving innan ávís økir, ið eru tengd at:
- betri gagnnýtslu av alifirðum,
- aling á landi,
- fiskavælferð,
- lús og smittuspjaðing
- nýggjum framleiðslumøguleikum

Sáttmálin er liður í arbeiðinum hjá Føroya Landsstýri at verkseta *Heimsmálini fyri burðardygga menning*, og soleiðis fáa vitan til eina varandi aling.

Nærri lýsing av arbeiðinum hjá Fiskaaling komandi árini:

Framleiðslan av laksi hevur verið í stórari menning seinast árini. Ein av stóru avbjóðingunum er framvegis lúsin, tað verið seg laksalús ella seiðalús, ið hevur neiliga ávirkan á fiskavælferðina, bæði tá lúsin situr á laksinum eins og viðgerðin móti lús kann skaða fiskin. Tørvur er á at fáa meiri vitan til vega um lús, og Fiskaaling fer framvegis at arbeiða við at menna vitanina um m.a. lívfrøðina hjá lús, útbreiðsluna av lús, hvussu lúsin smittar og hvussu hon kann basast.

Rognkelsi eru í dag týðandi amboð at basa lús, men vitanin um, hvussu rognkelsi kunnu trívast betri í aliringum á sjónum og harvið virka sum effektivir lúsaátarir er framvegis avmarkað. Fiskaaling fer tí at halda fram við at hava fokus á rognkelsi.

Arbeiðið at menna vitan og tøkni til at ala á streymasjógvi og meira harðbalnum økjum heldur fram. Fokus verður á streym- og aldu á verandi alifirðunum og nýggjum økjum, menning av aliútgerð, vælferðina hjá fiski umframt vitan um umhvørvið og umhvørvisárin av aling.

Framleiðslan á landi økist alsamt og tí er Fiskaaling nýliga fari í gongd við at menna vitan um resirkulering av vatni og virknaðin av biofiltrum, vatngóðsku, strongdarmátingar av fiski og smoltifisering. Hetta arbeiðið heldur áfram.

Arbeitt verður við verkætlanum, ið kunnu verða við at menna vitan um nýggjar framleiðslumøguleikar. Umframt at víðarimenna aling av rognkelsum og tara, verður hugt nærri eftir umstøðunum at ala skeljadjór í Føroyum. Eisini verður fokus sett á at víðarimenna dygdina av føroyskum rognkelsum og at virðisøkja taran og finna nýggjar møguligar nýtsluhættir av hesi ráðvøru.

Arbeitt verður víðari við at dagføra og útbyggja granskingarkervi. Umstøður til royndarvirksemi skulu mennast og KT-kervið til at goyma dátur og fremja teldusimuleringar verður styrkt.

Á hvørjum ári, verður ein avrikslisti gjørdur, sum verður útflýggjaður Uttanríkis- og vinnumálaráðnum saman við grannskoðaðum roknskapi.

## § 3
## Sáttmálatíðarskeið

Sáttmálin er galdandi til 31.12.2020. Partarnir taka upp samráðingar um nýggjan sáttmála eftir 1.4.2020. Stuðulsupphæddir og treytir annars í hesum sáttmála eru ikki bindandi fyri ein møguligan nýggjan sáttmála.

## § 4
## Stuðul

Uttanríkis- og vinnumálaráðið rindar P/F Fiskaaling stuðul til endamál, sum svarar til játtan løgtingsins. Árligi stuðulin verður fluttur felagnum, tá Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið avrit av grannskoðaðum ársroknskapi fyri árið frammanundan, tó soleiðis, at eitt aconto gjald á kr. 2 mió. verður útgoldið til P/F Fiskaaling í januar mánaði. Stuðulin er soleiðis treytaður av játtan á løgtingsfíggjarlógini fyri tey einstøku árini. Um játtanin á fíggjarlógini verður skerd, verður stuðulin skerdur við í minsta lagi sama lutfalli.

Møguliga ikki nýttur stuðul til ávísa verkætlan, skal rindast aftur til landskassan, eftir at verkætlanin er endað. Um eitt ella fleiri av teimum økjum, sum ikki eru tíðaravmarkað verður niðurlagt, skal ikki nýttur stuðul til hesi øki rindast aftur til landskassan.

Felagið kann søkja um, at býtið av árliga stuðulinum til nevndu øki og verkætlanir verður broytt, og skal P/F Fiskaaling skrivliga boða Uttanríkis- og vinnumálaráðnum frá hesum seinast ein mánað áðrenn nýtt stuðulsár byrjar, og skal landsstýrismaðurin skrivliga góðkenna hetta fyri hvørt einstakt ár.

## § 5
## Stuðulsroknskapur, eftirlit v.m.

P/F Fiskaaling ger uppgerð yvir nýtsluna av stuðlinum einaferð um árið. Uppgerðin skal útgreinast soleiðis, at tað greitt framgongur, at stuðulin verður nýttur til røttu endamálini, jvb. § 2, og skal grannskoðast av løggildum grannskoðara. Í hesum sambandi bindur P/F Fiskaaling seg til at geva grannskoðaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar til grannskoðan av stuðlinum og skal syrgja fyri, at grannskoðarin fær møguleika at gera tær kanningar, ið neyðugar eru fyri at grannskoða uppgerðina. Uppgerðin skal sendast Uttanríkis- og vinnumálaráðnum skjótast gjørligt, eftir at hon er grannskoðað og seinast 1. juni í hvørjum

eftirfylgjandi ári, jvb. eisini undir § 6, ársroknskaparframløga. Uttanríkis- og vinnumálaráðið kann fáa fulla upplýsing um úrslitini av verkætlanum, og Uttanríkis- og vinnumálaráðið kann í samráð við P/F Fiskaaling almannakunngera úrslitini.

**§6**
**Ársroknskaparframløga**

Stuðulin skal framganga undir fíggjarstøðuni í grannskoðaða ársroknskapinum hjá felagnum, og útgoldin, men ikki nýttur stuðul, skal ikki vera inntøkuførdur á rakstrarroknskapinum. So hvørt, sum stuðulin verður nýttur, skal hann førast yvir raksturin. Ársroknskapurin skal vera sendur Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, so skjótt hesin er grannskoðaður, og seinast 1. juni í hvørjum eftirfylgjandi ári.

**§ 7**
**Misrøkt/mishald**

Verður sáttmálin misrøktur ella mishildin, kann hann verða uppsagdur eftir hóskandi ávaring og freist til at útvega írestandi upplýsingar ella rætta møguligar skeivleikar.

Dagfesting:

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið

Poul Michelsen
Landsstýrismaður

Dagfesting:

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið

Herálvur Joensen
Aðalstjóri

Dagfesting:

P/F Fiskaaling

Kristoffur Laksá
Formaður

Dagfesting:

P/F Fiskaaling

Jóhanna Lava Køtlum
Stjóri